# Kasparov einaferð enn

**Sjálvt um hann er farin um tey 39 árini, so halda kappingarsigrarnir fram. Hesaferð vann Garry Kasparov eina sterka kviktalvskapping í Moskva**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



Síðani Hans Kristian Simonsen fyri júst einum ári síðani vann á Garry Kasparov í simultantelving á Norðoyarstevnu, hevur Kasparov ikki gjørt annað enn at vunnið kappingar aftaná kappingar. Ein øgilig russisk bjørn, sum ei kann temjast.

### Radjabov í finaluni

Av teimum mongu luttakararnum í kviktalvskappingini, nevnd Fide Moscow Grand Prix, vóru millum annað Ruslan Ponomariov, Alexander Grischuk, Peter Svidler, Predrag Nikolic og Teimour Radjabov, sum allir hava verið í Føroyum í talvørindum, umframt sjálvandi Kasparov, sum fyri ári síðani bergtók føroyingar, tá hann vitjaði.

Kasparov leikti seg sum væntað í finaluna, har hann á vegnum eitt nú basti Grischuk og Khalifman. Bert Khalifman gav Kasparov hampuliga mótstøðu. Eftir bæði kviktalvini stóð á jøvnum 1-1, og tí mátti umdystur til, sum favoritturin loksins vann 1,5 - 0,5.

15 ára gamli Teimour Radjabov úr Azerbadjan — somuleiðis upprunaheimlandi hjá Kasparov — telvaði nærum óhugnaliga væl. Hann gjørdi ikki mætari enn at vinna á bæði Svidler og Ivanchuk, og í hálvfinaluni vann hann eftir umdyst á veterananum Beliavsky.

Finalan varð tí millum Kasparov og Radjabov, sum Kasparov fyri nøkrum árum síðani spáddi eina bjarta framtíð fyri. Men tá talan er um at prógva sítt virði, er Kasparov kompromis-leysur. Hann gjørdi bart við at vinna við hvítum og leika javnt við svørtum uttan hóvasták. Radjabov varð tó stjørnan í Moskva, og við sínum bert 15 árum, fer stjørnan ivaleyst at bleiktra enn meir í nærmastu framtíð.

### Fredriksberg Sommerskak

Fredriksberg Skakklub í Keypmannahavn skipaði fyri vikuskiftiskapping 7-9. juni, og ein av føroysku útisetunum hættaði sær við, nevnliga eg sjálvur. Í hesum døgum eru prógvtøkudagar, og tískil eru ikki stundirnar nógvar til frítíðarvirksemi hjá flestu útisetunum. Undirritaði hevði tó lokið prógvtøku, og fór tí við eldhuga at royna seg í Fredriksberg.

Hampiliga væl gekst í hesari prógvtøkuni, tí úrtøkan bleiv eitt annað pláss við trimum stigum av fimm møguligum (vann tvey, tvey jøvn og tapti eitt), og 16 ratingstig rætta vegin á føroyska ratinglistanum.

Tendensurin á føroyska ratinglistanum er góður. Fleiri fara yvir um 2200-markið, umframt at aðrir røkka 2100-markinum. Um 2300 markið hava vit Heina Olsen og IM John Rødgaard, meðan John Arni Nilssen stríðist manniliga at røkka 2400, og hesum málið er hann bert 16 ratingstig frá.

## Talvið hesa vikuna

**Kasparov, G (2838) — Radjabov, T (2610)**
Fide Moscow Grand Prix (finalan, 1. talvið), 05.06.2002

### Pirc-byrjanin

1.e4 g6 2.d4 Bg7 3.Ric3 c6 4.Rif3 d6 5.Be3 Rid7 6.Fd2 Rigf6 7.Bh6! (gott hjá hvítum at býta svarta bispin av) 7...Bxh6 8.Fxh6 e5 9.0-0-0 Fe7 10.h3 a6 11.dxe5 dxe5 12.Bc4 b5 13.Bb3 a5 14.a4! (steðgar svarta álopinum, umframt at leikurin gevur c4 puntin til riddaran) 14...b4 15.Rib1 Ba6 [15...Rixe4 16.Rhe1 er vandamikið fyri svartan] 16.Ribd2 0-0-0 17.Fe3 Kb7 18.Bc4 Ric5 19.Bxa6+ Kxa6 20.Ric4 Rifxe4 21.Rifxe5



(hvítur hevur helst avgerandi fyrimun. Eitt nú er c6-finnan veik) 21...Rd5 22.Rixc6 Fg5 23.Rxd5 Fxd5 24.Ri4xa5 Kb6 25.Rixb4 1-0

# Eystanstevnurenningin

RENNING
*Tíðindaskriv*

Í samstarvi við Højgaards Handilsvirki skipar Ítróttafelagið Roysnið fyri rennikapping á Eystanstevnu. Kappingin verður hildin fríggjakvøldið 14. juni. Seinastu árini hevur hendan kappingin verið ein fastur partur av skránni á stevnuni. Einir 60 luttakarar vóru í fjør.

Kappast verður í 6 ymiskum aldursbólkum, 4 hjá børnum og 2 hjá teimum vaksnu.

### Ruturnar

Børnini byrja øll áraka VVS-virkinum hjá P/F Zacharias Leitisstein. Tveir teir yngstu aldursbólkarnir renna út eftir keiini (Fjøruvegi), venda runt eina keylu og renna so aftur til startin. Smærru børnini renna hesa leið einferð, meðan tey størru renna tvær ferðir. Hesir teinar eru ávikavist uml. 350 og 700 m til longdar.

Tveir teir eldru aldursbólkarnir hjá børnum byrja sama stað, men renna hinvegin, niðan móti Sjómansheiminum eftir Fjøruvegi, sneiða til høgru eftir Heiðavegi til rundkoyringina, sneiða til høgru eftir Rókarvegi, sneiða til høgru inn á Fjøruveg og koma so á mál, har tey byrjaðu. Hesin teinurin er einar 1300 m til longdar.

Kappingin hjá børnunum er annað umfar av Grand Prix kappingini, sum fevnir um fýra umfør og endar á Ólavsøku. Fyrsta umfar var á Norðoyarstevnu, men av tí at bert trý tey bestu úrslitini hjá hvørjum einstøkum rennara telja við í samlaðu kappingini, ber enn til at gera seg galdandi, um man tekur lut í seinastu trimum kappingunum: á Eystanstevnu, Vestanstevnu og Ólavssøku.

Undan kappingini á Eystanstevnu liggja hesi á odda í kappingini hjá børnum:

| Nr. | Gentur —7 | Dreingir —7 | Gentur —10 | Dreingir —10 | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Gunnvá G. Jacobsen | John Viljam Johannesen | Louisa Østerø | Ivan Joensen | 40 |
| 2 | Jórunn Hansen | Betuel Hansen | Kirstin Hansen | Sigmund Olsen | 34 |
| 3 | Lydia U. Marsten | David Langgaard | Judit Hansen | Rói Clementsen | 30 |

| Nr. | Gentur —13 | Dreingir —13 | Gentur —17 | Dreingir —17 | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Marin í Dali | Robin Jønsson | Maria í Skorini Jacobsen | | 40 |
| 2 | Randi G. Jacobsen | Jan Elmar Sørensen | Súsanna D. Jákupsdóttir | | 34 |
| 3 | Jenny Svabo | Berint Kalsø | Kristin Gerðalíð | | 30 |

Tey vaksnu renna 10 km. Hóast øll byrja í senn, fevnir kappingin um tveir aldursbólkar: vaksin fødd í 1984 ella fyrr, og vaksin fødd í 1956 ella fyrr. Starturin er sum vant á Heiðavegi niðanfyri Brotið. Runnið verður úteftir til Sjómansheimið, har sneitt verður oman á Fjøruveg. Síðan verður runnið inn eftir Gulasteinsvegi og niðanaftur á Heiðaveg inni við Føroya Banka. Hendan leiðin skal rennast 9,5 ferðir. Seinastu ferð verður komið á mál við Sjómansheimið.

Kappingin hjá teimum vaksnu er samstundis 3. umfar í Grand Prix kappingini í renning, sum DSF, Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsan ítrótt, skipar fyri. Støðan eftir tvey umfør er henda:

| Nr. | Kvinnur | Stig | Menn | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Rigmor N. Arge | 80 | Bogi Lenvig | 80 |
| 2 | Sólfríð Fjallsbak | 40 | Cecil Weihe | 60 |
| 3 | Brindis Weihe | 39 | Bogi Joensen | 46 |

### Heiðursmerki og steyp

Timburhandilin í Runavík letur steyp til vinnandi kvinnuna og mannin, meðan 1, 2 og 3 í øllum bólkum fáa heiðursmerki.

### Tilmelding

Tilmelding fer fram við Sjómansheimið í seinasta lagi hálvan tíma áðrenn renningarnar byrja,. Luttøkugjaldið er kr. 20 fyri børn og kr. 30 fyri vaksin. Øll eru vælkomin at verða við, og vóna fyrireikarnir, at undirtøkan verður minst líka góð sum seinasta ár.




## Roknskapar- og fíggjarleiðari

Til trolvirkið P/F Vónin í Fuglafirði søkja vit eftir einum roknskapar- og fíggjarleiðara.

Á skrivstovuni starvast frammanundan 3 fólk, men við vaksandi virksemi er tørvur á einum fólki afturat at standa fyri roknskapar- og fíggjarstýringini.

**Starvið**
Starvið hjá roknskapar- og fíggjarleiðaranum umfatar m.a. hesi øki:
- at umsita ein part av dagliga bókhaldsarbeiðinum
- at hava ábyrgdina av at bókhaldið altíð er ajour
- at hava dagliga røkt av debitorum og kreditorum um hendi
- uppgerð av mánaðar-, kvartals- og ársroknskapum
- samskifti við peningastovnar og lánveitarar
- at røkja fíggjarstýringina hjá felagnum sum heild, íroknað dótturfeløgunum í Føroyum og uttanlands, herundir gerð av fíggjarætlanum og uppfylging av hesum
- at menna fíggjarstýringina samsvarandi stevnumiðum felagsins
- at hava ábyrgdina av EDV-viðurskiftum felagsins

**Førleiki**
Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald, roknskap og EDV og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

P/F Vónin er eitt altjóða virki, og tí er tað ein fyrimunur, at tú dugir at orða teg á føroyskum og enskum máli bæði í skrift og talu.

**Tær verður boðið**
Eitt avbjóðandi og sera mennandi starv í einum altjóða virki, har tú skal luttaka í einari framtíðar menning av felagnum. Bjóðað verður ein løn, sum samsvarar førleika tínum.

Starvið skal setast skjótast møguligt.

**Umsóknin**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2002. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til okkum og tosa við Jóhannus Danielsen (tlf. 471700) ella Klaus Rasmussen.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
reg. nr. 267
e-mail:
rasmussen@rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo

Sosialurin

# LANDROVER




2,0 TURBO DIESEL 112 HK VØRUVOGNUR ÚR Kr. 289.800,-
HEILGALVANISERAÐUR

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310·600

## Kvívíkar skúli

### søkir eftir lærara til skúlaárið 2002/2003

Vegna lærara í farloyvi, er eitt tíðaravmarkað starv við Kvívíkar skúla, skúlaárið 2002/2003.

**Førleikakrøv:**
Lærara, ið serliga kann undirvísa í tónleiki, svimjing/fimleik og annars øllum lærugreinum.

**Um skúlan:**
Kvívíkar skúli er ein fýraflokkaður skúli við næmingum frá 1. til 7. árgang. Næmingatalið komandi ár er 51. Fimm lærarar eru við skúlan og kemur tú at vera ein teirra. Skúlin er væl útgjørdur við fimleikarhøll, svimjihyli og telduhøli.

**Setanartrteytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meir fæst at vita hjá skúlaleiðaranum, Bjarna Heinesen, tlf. 421291 fartlf. 211504.

Umsóknir við prógvi og viðmælum skulu sendast til Kvívíkar Skúlastýrið í seinasta lagi 21. juni 2002 kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Kvívíkar skúla**
Att: Jan Andreasen
340 Kvívík

## Línuskipið MAI til sølu



### MAI TG 787

**Heimstaður:** Vágur
**Skipaslag:** Línuskip uttan fiskiloyvi
**Tilfar:** Eik / bók
**BRT:** 97,78
**Maskina:** Grenaa Diesel, 6s, 4t
**Maskinorka:** 368 kW / 500 HK

Skipið hevur vanliga nautiska útgerð, frystilast og frystarí.

Áhugaði kunnu venda sær til Føroya Banka í Vági, tlf. 373444.

FØROYA BANKI